# Trýst á ein knøtt…

## VEÐRIÐ



Petur Skeel Jacobsen, veðurfrøðingur greiðir frá um veðrið




**Veðrið í dag:**
Hann minkar vindin niður í lot av ymsum ættum og yvirhøvur turt og sólglottar. Hitalagið um ÷3 stig. Um kvøldið veksur hann vindin upp í hvassan vind av útsynningi og lýggjari.




**Veðrið fríggjadagin:**
Stívt andøvsgul upp í hvassan vind av útsynningi og stundum regn. Út á seinnapartin hækkar hann upp í vestan og sólglottar. Hitin millum 5 og 8 stig.




**Veðrið leygardagin:**
Strúkur í vindi ella hvassur vindur av útsynningi og stundum regn. Hitin millum 7 og 10 stig.

**Veðrið sunnudagin og mánadagin:**
Hvassur vindur ella skrið av vestri og æl-ingur, partvís kavi og hitin millum frostmarkið og 4 stig.

**Á største valstaðnum í landinum, Ítróttarhøllini á Hálsi, varð skipað fyri einari Exit Poll kanning**

METING
*Heri á Rógvi*

»Vilt tú vera við í einari veljarakanning við at trýsta á ein knøtt«, soleiðis segði tað útsenda umboðið frá Sosialinum við tey mongu, sum vóru og valdu í Ítróttarhøllini á Hálsi.

Sosialurin skipaði valdagin fyri einari sokallaðari Exit Poll kanning í Ítróttarhøllini á Hálsi, har fólk við at trýsta á ein knøtt kundi vera við í kanningin. Úrslitið var síðani leypandi lagt út á alnetið, har lesararnir hjá Sosialinum kundu fylgja við. Á heimasíðuni hjá Sosialinum, á sosialurin.fo, var so stórur áhugi fyri tiltakinum, at trupult var at koma inn á síðuna. Orsøkin var at so nógv vitjandi vóru. Ráð vóru fyri hesum. Allur grafikkurin varð tikin av, og henda hátt kundu túsundtals fólk – bæði í Føroyum og uttanlands – fylgja við.

1.448 fólk ella 17,2% av teimum, sum valdu á Hálsi, vóru so beinasom at hjálpa okkum við kanningini.

Ætlanin var at gera eina støðumynd av gongdini, og hetta skuldi samstundis eisini vera íkastið hjá Sosialinum sjálvan valdagin. Hóast endaliga úrslitið ikki gav heilt tað sama sum uppteljingin, so er Sosialurin framvegis væl nøgdur við kanningina, sum so avgjørt er eitt spennandi íkast á sjálvum valdegnum.

Sosialurin hevur við hesum gjørt sær nakrar royndir, og tað kann væl hugsast, at hetta verður roynt aftur, í einum ella øðrum líki.

Sosialurin takkar øllum teimum, sum hjálptu okkum við kanningini.



*Áhugin var stórur fyri Exit Poll telduni hjá Sosialinum, sum var sett upp til endamálið*
*Mynd: Álvur Haraldsen*

### Hitalagið kring knøttin

| | |
|---|---|
| Illulisat | ÷7 |
| Nuuk | ÷4 |
| Qaqortoq | ÷4 |
| Ammassalik | ÷5 |
| Saint John's | 8 |
| Halifax | 13 |
| Reykjavík | 2 |
| Seyðisfjørður | 4 |
| Tórshavn | 6 |
| Lerwick | 8 |
| Aberdeen | 9 |
| London | 9 |
| Tromsø | 4 |
| Bergen | 4 |
| Oslo | – |
| Stokkhólm | 5 |
| Keypmannah. | 7 |
| Helsinki | 0 |
| Moskva | ÷7 |
| Berlin | 4 |
| Warzawa | 0 |
| Kiev | ÷5 |
| Bukarest | 2 |
| Paris | 7 |
| Madrid | 10 |
| Róm | 15 |
| Malorca | 16 |
| Athen | 12 |
| Malta | 17 |
| Tunis | 17 |
| Beijing | 17 |
| New Dehli | 25 |
| Bangkok | 28 |
| Jakarta | 28 |
| Sydney | – |
| New York | 9 |
| Miami | 25 |
| Los Angeles | 22 |
| Meksikobýur | – |
| Panama | 31 |
| La Paz | 16 |
| Rio de Janeiro | – |
| Buenos Aires | 24 |

### LUFTTRÝSTIÐ




Eitt lágtrýst, 984 hPa. eystan fyri Ísland fer eystureftir og dýpist. Tað hevur kaldari luftrák á okkara leiðum við sær.




Lágtrýstið eystan fyri Hvarvið fer í landnyrðing og brúgvaløg haðani verða við Føroyar fríggjadagin við lýggjari veðri.

### HITALAGIÐ




Hitalagið mált frá 18/11 kl. 06[00]– 19/11 kl. 06[00]. Hitin í gjár: 6,3°
Minsti hiti máldur í nov.: ÷7,2° Mesti hiti máldur í nov.: 12,2°

### AVFALLIÐ




Avfallið: 8,0 mm – mált frá 18/11 kl. 06[00]– 19/11 kl. 06[00]
Avfallið higartil í november: 80,6 mm





BILLUTIR
ÚTVEGAST TIL FLEST ALLAR BILAR
F.A. BILLUTIR
tlf. 421605 fax 421666


## VESTFALLSKYRRINDI

15. nov.: Tendring
22. nov.: Fyrra kvarter
23. nov.: Mánin longst frá jørðini

Kelda. Álmanakkin 2001

| Dagur | Suðuroyar-/ Vágafirði fp. | sp. | Skúvoyar-/ Skopunarfirði fp. | sp. | Hestfirði/ Sundalagnum fp. | sp. | Vestmannasundi fp. | sp. | Mykinesfirði fp. | sp. | Nólsoyarfirði fp. | sp. | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp. | sp. | Leirvíksfirði/ Haraldssundi fp. | sp. | Kalsoyar-/ Svínoyarfirði fp. | sp. | Hvannasundi fp. | sp. | Fugloyarfirði fp. | sp. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 21. nov | 11.15 | 23.39 | 10.15 | 22.39 | 10.30 | 22.54 | 00.52 | 13.15 | 01.52 | 14.15 | 09.30 | 21.54 | 08.30 | 20.54 | 11.30 | 23.54 | 00.07 | 12.30 | 11.00 | 23.24 | — | 12.15 |
| 22. nov | — | 12.14 | 11.14 | 23.50 | 11.29 | — | 01.39 | 14.14 | 02.39 | 15.14 | 10.29 | 23.05 | 09.29 | 22.05 | — | 12.29 | 00.54 | 13.29 | 11.59 | — | 00.39 | 13.14 |
| 23. nov | 00.50 | 13.24 | — | 12.24 | 00.05 | 12.39 | 02.50 | 15.24 | 03.50 | 16.24 | 11.39 | — | 10.39 | 23.14 | 01.05 | 13.39 | 02.05 | 14.39 | 00.35 | 13.09 | 01.50 | 14.24 |
| 24. nov | 01.59 | 14.17 | 00.59 | 13.17 | 01.14 | 13.32 | 03.59 | 16.17 | 04.59 | 17.17 | 00.14 | 12.32 | 11.32 | 23.50 | 02.14 | 14.32 | 03.14 | 15.32 | 01.44 | 14.02 | 02.59 | 15.17 |